# Skaldsøgan Norðlýsi á føroyskum




**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út fantasy-skaldsøguna Norðlýsi eftir Philip Pullman. Hjalmar P. Petersen týddi úr enskum**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Alt broytist tann dagin, tá ið Lyra sníkir seg inn í harrastovuna á Oxford universitetinum. Fjald aftan fyri lenistólin sær hon rektaran hella eitur í vínið hjá Asriel lordi, pápabeiggja sínum. Lyra trýr valla sínum egnu eygum. Hví ætlar rektarin at drepa pápabeiggjan? Man tað hava nakað samband við loyndarfullu ferðir hansara til Arktis?

Tó er tað rektarin, sum gevur Lyru gyltu kumpassina, men hví má hon einki siga fyri vøkru og hugtakandi frú Coulter? Og hvørjir eru teir ræðuligu gloypararnir, ið stjala børn í Oxford? At kunna svara hesum spurningum, noyðist Lyra at fara somu leið sum pápabeiggin, á kanningarferð til Lapplands og Svalbarð, har pansarabjarnirnar ráða.

Norðlýsi er fantasy-skaldsøga til størri børn og ung, men kann avgjørt eisini verða lisin av vaksnum. Hon er fyrsta av trimum bókum, sum Pullman hevur skrivað undir felagsheitinum: Myrkursins frumevni.

Bøkurnar hava fingið framúr góða móttøku um allan heim og sum vera man nógvar virðislønir. Hetta eru spennandi fantasy-søgur í besta Tolkien og Potter stíli. Yvirnatúrligur máttur, góðir hjálparar og lívshættisligir fíggindar seta ferð á søgugongdina og gera, at tú verður ógvuliga spentur at fáa fatur í næsta parti: Tann tvíeggjaði knívurin, sum kemur í heyst.

Norðlýsi er 398 síður, heft við klaffum og kostar kr. 180.

# Semja um musikkskúlalæraralønir

LØNARSÁTTMÁLI
*Tíðindaskriv*

Fíggjarmálaráðið hevur gjørt semju við Føroya Musikklærarafelag um nýggjan sáttmála.

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2003 til 1. oktober í 2005.

Nýggjar lønartalvur eru gjørdar, og talvan verður tann 1. oktober 2004 longd við einum stigi. Karmurin um semjuna er 9%.

Áseting er gjørd um eftirsitiløn og onkur smávegis broyting er gjørd í sáttmálatekstinum.

Partarnir hava gjørt avtalu um strategiska og skipaða førleikamenning.

Semjan verður løgd á heimasíðuna hjá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, adressan er www.lnd.fo

# Tað nýggja tornið í Malmö

**Í 1970'unum var Malmö norðurlendskur høvuðsstaður innan stál og skipasmíð, ídag er býurin ein multikulturellur smeltiketil landfastur við Keypannahavn**

OYRASUND
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



*Turning Turso er komið upp á 36 hæddir nú og 18 hæddir eru eftir at byggja.*
*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

Síðani brúgvin um Oyrasund gjørdist veruleiki, er Svøríki, serliga Malmö, komið nógv nærri Keypmannahavn. Við hesum í huga er tað ikki so løgið, at føroyingar í Keypmannahavn hesa seinastu tíðina meira og meira eru farnir at leita sær bústað svensku megin.

Tann 265.000 íbúgvar stóri Malmö, triðstørsti býur í Svøríki, var einaferð í tíðini kendur um allan heimin fyri stálskipasmiðjuna hjá Kockums. har supertankarar vórðu sveisaðir saman. Tann tíðin náddi sítt hápunkt í 1970'unum. og tað var ikki ókent tá millum føroyingar at leita sær arbeiði har. Síðani er gingið spakuliga men stútt aftur á bakka við stálinum og serliga skipasmíðinum í takt við. at eysturlond hava tikið yvir tann marknaðin.

Umráðið kring skipasmiðjuna hjá Kockum er ídag ikki til at kenna aftur; tað einasta sum eftir er har av Kockums er hátøknifrøðilig kavbáta framleiðsla; stálídnaðurin er trokaður burtur av ITC (Information and Communication Technology).

Sama umráði er somuleiðis gjørt til ein útbúgvingarligan miðdepil og í forleingilsi hartil, eitt bústaðarøki hjá teimum vælbjargaðu. Hendan gjørdist alment sjónlig av álvara í 2001 tá skipað varð fyri einari stórari bústaðarmessu. Tað var tí tí ikki sørt symbolskt at umleið har sum Kockums kranin stóð, hesin krani sum í sínari tíð var heimsins størsti og sum øll hesi árini hevur verið eitt eyðkenni fyri Malmö, varð farið undir at byggja eitt torn, Turning Turso, til luxíbúðir.

Meðan Kockums kranin varð avskipaður fyri umleið tveimum árum síðani til heimsins størstu skipasmiðju, suðurkoreansku Hyundai, varð bygt víðari upp á Turning Turso. Tað er nú komið væl áleiðis við byggingini av hesum dýra bústaðarhúsi sum kanska verður eitt nýtt høvuðs eyðkenni fyri Malmö.

Liðugt bygt kemur tað 54 hæddir høga Turning Turso sambært byggiharrans metingar at kosta umleið eina milliard í donskum krónum, eitt sindur meira enn eitt heilt ár av samlaðum íløgum hjá Malmö í skúlar, gøtur og parkir. Byggiharrin fyri Turning Turso, íbúðarfelagið HSB Malmö, hevur teknað eina trygging upp á smáar 200 milliónir krónur í trygdargrunni felagsins sum skal dekka kostnaðin fyri einar 50-60 óseldar íbúðir yvir sjey ár; eitt alternativ er eisini at leiga út hesar eigaraíbúðir tey fyrstu árini fyri at verja seg ímóti ov møguligum tapi; íbúðirnar í torninum verða tilsamans 152.

Worst case scenario í útrokningunum hjá HSB er at felagið sleppur ikki av við meira enn helvtina av íbúðunum. Men sambært Sydsvenska Dagbladet er stjórin í HSB Malmö, Johnny Örbäck, ikki so svartskygdur, og tankin um at ikki fleiri enn tær núverandi sjey íbúðar sáttmálarnir fáast í lag tykist ikki nerva hann.

– Um so verður mugu bara lækka prísirnar, helt hann fyri. Tað var júst hetta sum rakti byggifelagið NCC á íbúðarmessuni Bo01. Tey dýrastu húsini har standa framvegis tóm.

Örbäck upplýsir at 15 prosent av tí nærmasta áhugabólkinum sum í løtuni kunnu væntast at skriva undir íbúðar sáttmála, eru altjóða viðskiftafólk ið hava teknað seg via internetið; hesi eru úr millum USA, Brasil, Týsklandi og Danmark.

Men Malmö er eisini ein alt meira multietniskur og multikulturellur býur. Har búgva fólk úr heimsins heraðshornum; og sambært almenn hagtøk eru 24 prosent av íbúgvunum føddir uttanlands.

# Eitt smidligari sjónvarp

**- Tað skal vera lættari at seta sær felags mál og fylgja teimum upp, sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri, um bygnaðarbroytingarnar í SvF. Talan verður um umrokeringar av starvsfólkum, men ikki uppsagnir**

SJÓNVARP
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*- Bygnaðurin í SvF skal broytast, so reyði tráðurin í øllum arbeiði gerst sjónligari, sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri*

Ymsu deildirnar í Sjónvarpinum hava higartil ikki dugað nóg væl at arbeiða saman. Til tíðir hevur yvirblikkið manglað, samskipanin haltað, og reyði tráðurin blivin nakað kámur.

Tí er Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri, farin undir stórar bygnaðarbroytingar á sínum stovni.

– Endamálið er at skapa ein greiðan bygnað við einum greiðum ábyrgdarbýtið, sigur Mikkjal Helmsdal.

Ítøkiliga merkir hetta, at tíðindadeildin, mentanardeildin, samsiftisdeildin og fremleiðsludeildin verða niðurlagdar.

Og tí hava leiðararnir á hesum deildum fingið at vita, at tey eru søgd úr størvi, tí starv teirra verður niðurlagt.

– Men talan verður ikki um at koyra fólk til hús. Í fyrstu syftu gerast tey vanlig programfólk, og hava so sjálvsagt møguleikan at søkja leiðarastørvini í nýggja bygnaðinum, sigur Mikkjal Helmsdal.

## Greiðan málsetning

Frá 1. oktober í ár skal Sjónvarpið skipast við tveimum nýggjum deildum, eini program-framleiðsludeild og eini skrádeild.

Fyrrnevnda verður skipað við fleiri redaktiónum við hvør sínari arbeiðsuppgávu. Tað veri seg tíðindi, mentan osv. Redaktiónirnar verða væntandi 3-4 í tali, men ein grundtanki við broytingunum er, at talið av redaktiónum og uppgávurnar skal variera.

– Vit mugu gera okkum greitt, at SvF er so lítil stovnur, at vit megna ikki at røkja allar okkara public-service skyldur í senn. Tí mugu vit prioritera og finna eina rotatiónsskipan, vísir Mikkjal Helmsdal á.

Hann leggur afturat, at á hvørjum ári skulu greiðir málsetningar setast fyri komandi árið.

Høvuðsuppgávan hjá hini nýggju deildini í SvF, skrádeildini, verður at leggja ein felags strategi fyri stovnin, at eftirmeta arbeiðið og ikki minst fylgja tí upp, umframt at taka sær av førleikamenning.

Sjónvarpsstjórin vísir á, at við hesum broytingum verður lættari at seta sær felags mál fyri stovnin. Reyði tráðurin í arbeiðinum gerst sjónligari.

## Samskipan

Mikkjal Helmsdal metir avgjørt, at neyðugt er við bygnaðarbroytingum í Sjónvarpinum. Hann vísir á, at bygnaðurin hevur ikki verið serliga greiður, og talan hevur verið um sjálvstøðugar deildir, har deildarleiðarar eitt nú hava havt ábyrgdina av fíggjarliga partinum. Tankin var, at avgerðin skuldi takast so nær teimum, ið hon fevndi um.

– Vansin er, at yvirlitið og samskipanin ikki altíð hevur verið nóg góð. Og tann, ið situr omanfyri, veit ikki altíð, hvar SvF flýtur.

Tí metir Mikkjal Helmsdal eisini, at bygnaðurin hevur havt sín lut í fíggjarligu trupulleikunum, ið Sjónvarp Føroya tíðum er komið sær út í.

Við nýggja bygnaðinum skulu redaktørarar, saman við framleiðara, einans taka sær av at framleiða sendingar, meðan yvirskipaða tilrættaleggingin av arbeiðinum á deildini, umframt fíggjar- og ressoursustýring, skulu liggja hjá leiðaranum á programmframleiðsludeildini.

Síðan síðsta summar hevur ein arbeiðsbólkur arbeitt við bygnaðarbroytingunum í SvF, í vetur var ein "kritik-dagur", har starvsfólkið kundi siga sína hugsan, og við uppsøgnunum av deildarleiðarunum er fyrsta formella stigið tikið.

– Í dag eru 57 ársverk í Sjónvarpi Føroya, og talið verður tað sama eftir bygnaðarbroytingarnar, sigur Mikkjal Helmsdal, ið hósdagin skuldi kunna starvsfólkini um broytingarnar.

# 70.000 sms um dagin

**Fýra av fimm føroyingum hava fartelefon og sms-boðini hava vind í seglunum.**

FARTELEFON
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

1. januar í ár vóru tilsamans 38.026 fartelefonir í Føroyum. Hetta tal byggir á talið av føstum haldi og talutíðarhaldi hjá kappingarneytunum Føroya Tele og Kall.

Tað skal sjálvandi havast í huga, at summi kanska hava meira enn eina fartelefon, og at til dømis útisetar hava eitt talutíðarhald liggjandi heima á klettunum. Men talið vísir so, at í prinsippinum hava fýra av fimm føroyingum fartelefon.

Í síni ársfrágreiðing staðfestir Fjarskiftiseftirlitið, at árið í fjør var merkt av, at Kall kom á marknaðin við fartelefoni í desember 2002.

Og Kall hevur vunnið fittan part av marknaðinum, síðan fyritøkan fór at bjóða seg fram á økinum. Kall hevði 1. januar 2098 fastar haldarar og 5610 talutíðarhald í umfar, og tað svarar til ávíkavist 13 og 28 prosent av marknaðinum.

Á nýggjárinum vóru tilsamans 16.699 fartelefonhald, tvs. har brúkarin rindar eitt mánaðargjald fyri fartelefon, í Føroyum, meðan talutíðarhaldini vóru heili 20.088 í tali.

Harumframt eru 1239 NMT-450 hald framvegis skrásett í Føroyum.

## 12,7 mió. sms

Tølini í ársfrágreiðingin hjá Fjarskiftiseftirlitinum vísa, at føroyingar eru rættuliga raskir at senda sms-boð. Seinna hálvár í fjør vóru sendir 12,7 milliónir sms frá fartelefonum í Føroyum. Tað svarar til 70.000 sms um dagin. Og eitt sindur avrundað ber til at siga, at frá hvørjum einasta fartelefonnummari í Føroyum verða send tvey sms um dagin, hvønn dag.

# Føroyar mugu taka ábyrgd av umhvørvinum

**Nær verður ein elveitingarlóg klár at leggja fyri tingið, í hvønn mun fer ein tílík at loyva øðrum fram at kervinum hjá SEV, hvussu skal framtíðar býtið millum orkukeldurnar vera og skulu ásetingar gerast um at gagnnýta avlopshita. Tað vil John Johannesen, tingmaður hava at vita frá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í orkumálum**

FYRISPURNINGUR
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*John Johannesen, tingmaður*

Løgtingsmaðurin John Johannesen úr Javnaðarflokkinum hevur sett ein skrivligan fyrispurning til Bjarna Djurholm, landsstýrismann í orkumálum, um framtíðar yvirskipaða orkupolitikkin í Føroyum.

Tingmaðurin vísir á, at samgongan hevur sett sær fyri at yvirskipaði orkupolitikkurin skal vera ein landspolitisk ábyrgd, og at ein elveitingarlóg skal orðast. Tí vil hann hava at vita, nær ein slík verður klár at leggja fyri løgtingið.

John Johannesen vil eisini hava landsstýrismannin í orkumálum at greiða frá, í hvønn mun ein elveitingarlóg fer at loyva øðrum privatum veitarum inn á elkervið. Eisini spyr tingmaðurin, hvørjar umhvørvisligar ásetingar verða gjørdar um býtið av orkuframleiðsluni, tvs. hvussu nógv skal framleiðast úr diesel, úr vatni og úr alternativari orku.

Til seinast spyr John Johannesen, um ásetingar verða gjørdar um í størstan mun at gagnnýta avlopshitan frá elframleiðslu.

## Føroyar dálka

Í viðmerkingum til skrivliga fyrispurningin vísir John Johannesen á, at ein vísindalig kanning, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan almannakunngjørdi fyri hálvum triðja ári síðan vísti, at Føroyar teljast millum mest luftdálkandi lond í heiminum, roknað uppá hvønn íbúgva.

Tingmaðurin vísir á, at SEV framleiðir framvegis størsta partin av elorkuni burtur úr dálkandi dieselolju og vatnorku, ið hevur stór árin á lokala umhvørvið. Bert ein lítil partur verður framleitt úr vindorku, og einki úr øðrum, alternativum orkukeldum. Og heldur ikki verður stóra avlopsorkan frá dieselverkunum gagnnýtt.

At taka ábyrgd av umhvørvinum er at taka veruliga altjóða ábyrgd. Hesa ábyrgdina eiga Føroyar eisini at átaka sær, staðfestir John Johannesen, tingmaður, í skrivligum fyrispurningi til Bjarna Djurholm.

## Rætting

Í blaðnum týsdagin skrivaðu vit, at Kærunevndin hjá Fjarskiftiseftirlitinum hevur staðfest, at Føroya Tele framdi krossstuðul og harvið breyt konsessiónina í samband við at mánaðargjaldið á uppringda internetsambandinum varð strikað.

Rættari er at siga, at Kærunevndin vísir á vandan fyri krossstuðli, tá talan er um eitt øki, ið gav undirskot. Men Kærunevndin tekur ikki støðu til eitt møguligt brot á konsessiónina.

**jbh**